FISKIMÁLARÁÐIÐ

# Stjóri til Havstovuna

Søkt verður eftir stjóra til Havstovuna.

**Ábyrgdarøki**
Stjórin hevur evstu ábyrgd av dagliga virksemi stovnsins, og at allar høvuðsuppgávur innan øll starvsøki á stovninum verða loystar á besta hátt.

**Høvuðsuppgávur**

- Granskingarvirksemi, har høvuðsendamálið er at økja um vitanina um fiskastovnar, tilfeingi í havinum og umhvørvi teirra.
- Samstarv við aðrar granskingarstovnar í Føroyum og uttanlands innan viðkomandi evni.
- Kunning til landsins myndugleikar og almenning um støðuna hjá fiskastovnum og havumhvørvi.
- Ráðgeva landsins myndugleikar um bestu gagnnýtslu av tilfeingi og burðardyggari stovnsrøkt.
- Fíggjarstýring og at tryggja, at játtanir verða hildnar, eins og at øll orka á stovninum verður gagnnýtt á besta hátt.
- Leiða og leggja til rættis arbeiðið innan alt virksemi á stovninum.

**Førleikar og royndir**

- Viðkomandi útbúgving á master– ella kandidatstigi t.d. innan fiskifrøði, havfrøði ella lívfrøði.
- Fyrimunur er, at umsøkjarin hevur leiðslu- og starvsroyndir, ið kunnu setast í samband við virkisøki stovnsins.
- Fyrimunur er, at umsøkjarin hevur góð evni at samskifta í almenna rúminum og beinleiðis við føroyskar og útlendskar myndugleikar, umframt onnur umboð.
- Samanumtikið skal umsøkjarin hava útbúgving, førleikar og royndir, ið beinleiðis eru viðkomandi fyri starvið, ábyrgdarøkið og høvuðsuppgávurnar.

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt ájavnt 38. lønarflokki eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið, hini stjórnarráðini og stovnar undir ráðunum.

**Umsókn**
Umsókn við upplýsingum um prógv, royndir og møgulig viðmæli skal sendast talgilt til Fiskimálaráðið á fisk@fisk.fo ella sum vanligur postur til Fiskimálaráðið, postrúm 347, 110 Tórshavn.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 8. november 2021 kl. 16:00.**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið fáast frá Rógva Reinert, aðalstjóra, telefon 55 32 11, teldupostur fisk@fisk.fo.

***Havstovan*** *er stovnur, sum bygnaðarliga er skipaður undir Fiskimálaráðnum. Sambært lógini ger Havstovan kanningar av livandi tilfeinginum og umhvørvi tess í føroyskum sjógvi og á teimum havleiðum, har føroyska fiskivinnan hevur áhugamál. Kunning av granskingarúrslitum og ráðgeving innan somu øki eru týðandi partur av virkseminum hjá stovninum. Rannsóknarskipið "Jákup Sverri" er beinleiðis knýtt at stovninum.*
*Á stovninum eru 37 starvsfólk. Harumframt sigla 14 fólk við Jákup Sverra. Fíggjarliga játtanin til stovnin og skipið er umleið 32,7 mió. kr. í 2021.*
*Sí annars heimasíðu stovnsins, www.hav.fo.*